**Samandráttur av greinini:** **Reproduction of Faroe plateau cod: Spawning grounds, egg advection and larval feeding**
Fróðskaparrit 48. bók, 87-103, 2001

Eilif Gaard, Petur Steingrund

## Nøring hjá toski á Landgrunninum: Gýtingarøki, eggspjaðing og føðin hjá larvunum

## Samandráttur

Føroyski Landgrunstoskurin gýtir serliga á tveimum økjum, ið liggja stutt innan fyri sjóvarfalsfrontin, ið skilir Landgrunssjógvin frá opna havinum. Gýtingin kann vara frá februar og til seint í apríl, men høvuðsgýtingin er í seinnu helvt av marsmánaði. Tey seinast gýttu rognkornini eru smærri enn tey, ið eru gýtt tíðliga. Eftir gýtingina reka rognkornini við sólini runt Landgrunnin. Flestu toskalarvurnar byrja at eta í apríl. Um hetta mundið er nøringin av djóraæti ikki rættiliga byrjað á innaru Landgrunsleiðunum, men á hellingini vestanfyri og norðanfyri rekur reyðæti (*Calanus finmarchicus*) frá árinum fyri inn á Landgrunnin og byrja gýtingina longu í apríl. Kanningar frá apríl 1995 og 1999 vístu, at tað fyrsta, ið toskalarvurnar tóku, var serliga vatnloppu egg, ið eftir støddini, verður mett at vera *C. finmarchicus* egg. Vatnloppu nauplius larvur høvdu bert lítlan týdning sum føði fyri hesar toskalarvurnar. Gýtingarøkini hjá toskinum eru nærhendis leiðunum, har mest verður gýtt av *C. finmarchicus* eggum tíðliga á vári. Hetta ger, at toskarognkorn og -larvur og teirra høvðusføði reka samstundis frá gýtingarleiðunum hjá toski. Tey reka við sólini, eystureftir norðan fyri Føroyar, og verða síðan spjadd runt Landgrunnin. So hvørt sum toskalarvurnar vaksa, taka tær sær størri og størri føði. Kanningar í mai 1995 vístu, at tær ótu vatnloppu naupliur, ungar *C. finmarchicus* og ymisk sløg av Landgrunsvatnloppum (serliga *Acartia* og *Temora*), ið vóru gýtt á Landgrunninum sama várið.